ENDURLÝSING

# 1/4 millión

## til at marknaðarføra Føroyar

Fyrr í ár var ein millión sett av til serlig marknaðarátøk. Enn eru 250.000 kr. tøkar til endamálið, og bjóðar SamVit tí til samstarv um at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál uttanlands.

Peningurin skal nýtast soleiðis, at føroysk virki/feløg kunnu søkja um stuðul til verkætlanir eftir »krónu fyri krónu« háttinum. Hetta vil siga, at umsøkjarin letur eins stóra upphædd til verkætlanina, sum SamVit stuðlar við.

### Verkætlanir

Minsti stuðul, ið verður latin einstakari verkætlan, er 50.000 krónur, og mesti stuðul er 250.000 krónur.

Nýskapandi tiltøk hava fyrimun. Verkætlanir, har tvey ella fleiri virkir/feløg ganga saman, hava eisini fyrimun. Verkætlanin skal ikki vera partur av vanligu marknaðarrøktini. Stuðul verður ikki latin til faldarar, uttan so at teir eru beinleiðis knýttir at verkætlanini, ið søkt verður um stuðul til.

Tað ber til at samstarva við sambond uttanlands, men bert tann føroyski parturin í verkætlanini fær stuðul.

Stuðulin verður útgoldin, tá ið verkætlanin er framd í verki.

### Upplýsingar

Í umsóknini skal í øllum førum verða greitt frá:

- endamáli
- kostnaðarætlan
- fíggjarætlan
- tíðarætlan
- samstarvspørtum

### Umsóknarblað

Umsóknir skulu sendast SamVit á serligum umsóknarblaði, ið kann takast niður á www.samvit.fo, og sum annars er at fáa frá SamVit. Meira fæst at vita við at venda sær til Per Hansen á tlf. 30 69 00.

### Umsóknarfreist

Umsóknarfreistin er 1. juli 2008.

SamVit

SamVit · undir Bryggjubakka 12 · Postsmoga 118 · FO-110 Tórshavn
Tlf +298 30 69 00 · Fax +298 30 69 01 · www.samvit.fo

SENDISTOVAN

STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur/byggifrøðingur til framleiðsludeildina [Endurlýsing]

Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi ella líknandi til framleiðsludeildina á Landsverki. Framleiðsludeildin hevur asfalt- og skervverkini og maskindeildina um hendi. Nýggja starvsfólkið fer at hava mest við asfaltverkið og útlegging av asfalti at gera, herímillum at leggja asfaltarbeiði til rættis. Fýra skervverk eru kring landið: í Hundsarabotni, í Porkeri, á Hústoft og á Sandi. Bitumengoymsla er í Hósvík. Asfaltframleiðslan er í Hundsarabotni.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar eru tilrættislegging o.a. í sambandi við framleiðslu og útlegging av asfalti, umframt góðskustýring innan virksemið á deildini. Tann, ið fær starvið, kann eisini rokna við at arbeiða við øðrum uppgávum á stovninum. Fasta tilhaldið verður á skrivstovuni í Havn.

**Førleikakrøv**
Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur/byggifrøðingur ella líkandi ástøðiliga útbúgving og hevur góðan kt-kunnleika. Fyrimunur er eisini at hava royndir við asfaltframleiðslu, tó at hetta ikki er krav. Rætti persónurin við áhuga fyri at seta seg inn í nevnda virkisøkið fær møguleika at menna seg á hesum øki og fær viðkomandi upplæring.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum skulu sendast til:
Landsverk,
Postboks 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 23. juni, 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á tlf. 540 841 ella á to@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

# MONTØRUR

**Casa søkir eftir montøri at byrja beinanvegin.**

Casa er partur av Nema-samtakinum og bjóðar skrivstovuinnbúgv til virkir og stovnar, umframt sniðinnbúgv til heimið. Vit leggja dent á holla ráðgeving og fyrsta floks tænastu.

**Arbeiðið er bygt á toymi og fevnir um**
· Montering og uppseting av møblum á verkstaði okkara og úti hjá kundum
· Flutningsuppgávur til og frá goymslum okkara
· Aðrar uppgávur í samráði við leiðaran í Casa
· Internar húsavarðaruppgávur
· Annað fyrifallandi arbeiði í hesum sambandi

**Yrkisførleikar**
Vit vænta, at tú hevur royndir í yrkinum og hevur handverksligan førleika. Koyrikort er krav, og fyrimunur er eisini at kunna koyra trukk og lastbil.

**Eginførleikar**
Tú ert fyrikomandi og skyldurøkin, sýnir áræði og ábyrgd, og tú arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum. Tú ert líkamliga væl fyri, tí starvið kann stundum vera kropsliga krevjandi.

Arbeiðsvikan er 40 tímar, og lønin verður sambært avtalu. Heldur tú, at starvið er nakað fyri teg, frætta vit fegin frá tær. Umsókn skal vera okkum í hendi innan mánadagin 16. juni og skal stílast til:

**NEMA**
Starvsfólkadeildin, att: Sam Jakobsen, HR-leiðara
Brekkutún 4
Postmoga 109
110 Tórshavn



NEMA

casa
www.casa.fo

SENDISTOVAN